## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi, um kvøldið minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin lot av eystri, men seinnapartin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av landnyrðingi. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði, sunnudagin minni vindur. Ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.

# Fingu hemara við tráðu

**Fimm ungir havnarmenn fingu á ein heldur óvanligan hátt ein hemara, tá teir royndu eystan fyri Nólsoynna mánadagin. Við tráðu eydnaðist teimum at fáa ein stóran hemara**

HEMARI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Fimm ungir havnarmenn fingu mánadagin ein hemara á ein heldur óvanligan hátt. Havnarmenninir royndu við bátinum, Møn, eystan fyri Nólsoynna, og tá teir løgdu at Ískeini í Havn um trý-tíðina mánadagin, kundu teir breggja sær av, at teir høvdu ein stóran hemara á dekkinum.

Tað er ikki tí, at hemari er heilt óvanligur á okkara leiðum, men tað var meira hátturin, ungu havnarmenninir fingu hemaran til høldar, ið er forvitnisligur og ókendur í Føroyum.

Hemari er rovfiskur og ikki lítil í støðd, men kortini eydnaðist tað monnunum á Møn at fanga hann við eini tráðu. Teir høvdu ein tríggjar metur langan veir í húkinum, sum hjálpti teimum at fáa hemaran til høldar. Í Føroyum er ikki óvanligt at vera á hemaraveiðu við línu, men fáur hevur áður hoyrt um hemaraveiðu við tráðu.

### 240 pund

Teir fimm havnarmenninir nýttu heilar tveir tímar frá tí, at teir fingu hemaran at bíta, til hann endiliga lá í bátinum. Henda tíðin varð nýtt til at troytta hemaran, so hann at enda mátti geva seg yvir, og kundi fáast inn í bátin. Hemarin vigaði 240 pund. Havnarmenninir nýttu laks sum agn



*Her er hann so. Hemarin, sum teir ungu havnarmenninir fingu við tráðu eystan fyri Nólsoynna mánadagin. Hann vigaði 240 pund og var 235 cm langur* *Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | 3 |
| Halifax | 3 |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 10 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | ÷1 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 10 |
| Paris | 8 |
| Madrid | – |
| Róm | 20 |
| Malorca | 16 |
| Athen | – |
| Malta | 22 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 7 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 10 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 987 hPa. yviri á Suðurlandinum fer eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 986 hPa. vestan fyri Skotland fer eisini eystureftir.




Lágtrýstið við Ísland grynnist. Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi kemur móti Føroyum og gevur seinni í vikuni høgætt á okkara leiðum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/11 kl. 06⁰⁰– 18/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,2°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 17/11 kl. 06⁰⁰–18/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 60,9 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI




BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

## VESTFALLSKYRRINDI

17. november: Seinna kvarter
23. november: Tendring/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. nov | 02.25 | 14.46 | 01.25 | 13.46 | 01.40 | 14.01 | 04.25 | 16.46 | 05.25 | 17.46 | 00.40 | 13.01 | — | 12.01 | 02.40 | 15.01 | 03.40 | 16.01 | 02.10 | 14.31 | 03.25 | 15.46 |
| 20. nov | 03.06 | 15.27 | 02.06 | 14.27 | 02.21 | 14.42 | 05.06 | 17.27 | 06.06 | 18.27 | 01.21 | 13.42 | 00.21 | 12.42 | 03.21 | 15.42 | 04.21 | 16.42 | 02.51 | 15.12 | 04.06 | 16.27 |
| 21. nov | 03.48 | 16.10 | 02.48 | 15.10 | 03.03 | 15.25 | 05.48 | 18.10 | 06.48 | 19.10 | 02.03 | 14.25 | 01.03 | 13.25 | 04.03 | 16.25 | 05.03 | 17.25 | 03.33 | 15.55 | 04.48 | 17.10 |
| 22. nov | 04.32 | 16.55 | 03.32 | 15.55 | 03.47 | 16.10 | 06.32 | 18.55 | 07.32 | 19.55 | 02.47 | 15.10 | 01.47 | 14.10 | 04.47 | 17.10 | 05.47 | 18.10 | 04.17 | 16.40 | 05.32 | 17.55 |

5 707265 100036 >